

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

## Maskinførari m/k til Lendisdeildina

Søkt verður eftir **maskinførara** m/k til Lendisdeildina at byrja skjótast til ber.

Arbeitt verður við at gera gongugøtur o.a. viðlíkahald.

Koyrikort í flokki B ella traktorkoyrikort er eitt krav.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jógvan Olsen á fartelefon 27 36 80.

**Umsókn**
saman við møguligum viðmælum, verður at senda til Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 22. september 2008.

## Reingerðarfólk til Heimið fyri minnisveik

Søkt verður eftir **reingerðarfólki** at arbeiða 20 tímar um vikuna til Heimið fyri minnisveik í Vallalíð.

**Vit søknast eftir fólki sum:**

- kann arbeiða sjálvstøðugt
- dugir at samstarva og er fleksibult
- hevur hug og hegni at arbeiða við fólki, ið eru minnisveik

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett skjótast til ber og lønt eftir sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við møguligum viðmælum og upplýsing um royndir skulu sendast til Tórshavnar kommunu, Postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 29. september 2008.

**Meira at vita**
Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Idu Sørensen, leiðara, tel. 30 24 56 ella 21 73 39.

## Pedagogur til Dagstovnin á Velbastað

Søkt verður eftir **einum pedagogi** til Dagstovnin á Velbastað at byrja 1. oktober ella eftir avtalu. Møguleiki er at arbeiða fulla ella niðursetta tíð.

**Um stovnin**
Stovnurin hevur vøggustovu, barnagarð og frítíðarskúla. Stovnurin hevur góð hølisviðurskifti, stóran garð og liggur í náttúruvøkrum umhvørvi oman fyri bygdina á Velbastað.

**Viðurkennandi námsfrøði**
Okkara leistur at arbeiða eftir er viðurkennandi námsfrøði, og við einum nýggjum og øðrvísi starvsfólkabygnaði, leggja vit dent á samstarv, trivnað og menning. Í løtuni ganga 64 børn í aldrinum frá einum til átta ár á stovninum.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanarviðurskifti annars verða sambært sáttmála millum Føroya pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við viðmælum og upplýsingum um útbúgving og royndir skulu sendast til Dagstovnin á Velbastað, Norðuri á Heyggi 55, 176 Velbstað og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mikudagin 24. september 2008.

**Meira at vita**
Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Jóhonnu Rubeksen, leiðara, tel. 21 81 32.

**Tórshavnar kommuna**

# Íverksetanarstudningur til listafólk í 2009

Mentanargrunnur Landsins letur listafólki íverksetanarstudning við stoði í listaligum og fakligum metingum.

Íverksetanarstudningurin skal lætta um hjá evnarikum listafólkum, serliga ungum, at koma víðari við teirra skapandi listaarbeiði. Studningurin kann nýtast til tilfar, leigu av atelieri, námsferðir o.l.

Íverksetanarstudningurin er kr. 75.000,- árliga og kann í mesta lagi latast sama persóni í 2 ár.

**Umsóknir skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi mánadagin 15. desember 2008.**

**Mentanargrunnur Landsins** - Tórgarðsgøtu 42 - FO-100 Tórshavn
Tlf. 32 08 42 - fax 31 19 98
mentan@mentanargrunnur.fo - **www.mentanargrunnur.fo**




# Renault Laguna til sølu

Bilurin er frá desember 1998. Hevur fløguspælara og el-rútar. Bilurin er enskur, men er skrásettur í Føroyum og er góður at koyra.

Verður seldur **SERA BÍLIGA** vegna flyting.

**Áhugaði kunnu ringja á tel. 222081**